Ár 1959, 13. januar kl. 16, var fundur í landsstýrinum. - Á fundi vóru løgmaður, K. Djurhuus og Niels Winther Poulsen.

Til viðgerðar:

1) Býti av virkisøkjum millum limirnar í landsstýrinum.

Samtykt, at løgmaður fær hesi økir eftir heimastýrislógini lista A og B:

Lista A: nr. 1, 4, 5, 7, 8, 9 hvørt navigatiónsskúlar, 12, 15 ~~og 16~~ undantikið byggingarmál og 16 hvørt val av álitismonnum og eins rættindir fyri menn og kvinnur.

Lista B: nr. 3 og 5.

K. Djurhuus:

Lista A: nr. 6, 13 hvørt fiskiskapi og fritøku av fiski á territoriinum, 14 og 16 undantikið val av almennum álitismonnum og eins rættindir fyri menn og kvinnur.

Lista B: nr. 2.

Niels Winther Poulsen:

Lista A: nr. 2, 3, 9 undantikið navigatiónsskúlar, 10, 11, 13 og 15 hvørt byggingarmál.

Lista B: nr. 1 og 4.